LM-037/2025

FYLGISKJAL 4

Heilsuhjálparafelag Føroya

Almanna- og mentamálaráðið

Tórshavn 02.10.2025

Hoyringssvar viðvíkjandi uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
(ábyrgdin av dagtilboðum og umlætting til fólk vioð demens undir fólkapensjónsaldur verður flutt til kommununar)

Heilsuhjálparafelag Føroya tekur undir við, at mann broytir § 10, stk.1 soleiðis, at mann nú kemur at veita heimabúgvandi borgarum undir fólkapensjónsaldur við demens tænastur.

Vit meta, at tað er gott fyri demensøkið, at tænastan er samlað undir kommununum. Hetta vil føra við sær, at borgarar og avvarðandi nú skulu venda sær eitt stað, og eigur hetta at gera, at eingin borgari við demens framyvir kemur at detta niður ímillum skipanir.

Viðvíkjandi yvirlitinum yvir kostnað hjá Almannaverkinum fyri tænastur til demens, er ein upphædd áljóðandi kr. 4.600, mió sett á, hetta meta vit ikki er nøktandi. Hendan upphæddin vísir hvørjar útreiðslur, ið Almannaverkið hevur havt, og hevur teirra tænasta til hesar borgarar verið heilt minimal.

Heilsuhjálparafelag Føroya metir, at mann eigur at seta eina hægri játtan á, ið skal fylgja við tí, at hendan tænastan verður flutt til kommununar.

Heilsuhjálparafelag Føroya

Mary Antonsdóttir, forkvinna

Fr. Petersensgøta 7 · FO-100 Tórshavn
Telefon 317725 · Fax 319117 · email: hhff@hhff.fo · heimasíða.: www.hhff.fo